# Ein álvarsligur boðskapur til Føroya Fólk

**–Næsta ár verður ikki nóg mikið av pengum til tey veiku og sjúku, siga siga Kristian Magnussen og Andreas Petersen, sum hava gjøgnumgingið ein part av fíggjarlógini fyri næsta ár**




*Í nógvum førum hevur samgongan undirmett útreiðslurnar og tað er ein álvarsligur boðskapur til føroya Fólk, siga teir báðir Kristian Magnussen og Andreas Petersen, nú teir hava gjøgnumgingið ein part av fíggjarlógini*

FÍGGJARLÓGIN 2004
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er ein álvarsligur boðskapur til Føroya Fólk

Tað halda teir báðir løgtingsmenninir, Kristian Magnussen og Andreas Petersen úr javnaðarflokkinum um fíggjarlógina, sum samgongan ætlar at seta í gildið fyri komandi ár.

Teir eru báðir limir í trivnaðarnevndini hjá løgtinginum og nú fíggjarlógin er til viðgerðar í fíggjarnevndini, hava teir báðir gjørt sínar viðmerkingar til trivnaðarpartin í uppskotinum.

Og har hava teir báðir nógv at finnast at, tí teir siga, at verður fíggjarlógin, sum samgongan ætlar, verður grundleggjandi tørvur hjá sjúkum og veikum ikki at nøktaður komandi ár,

### Mangla hundraðtals milliónir

Í fyrsta lagi meta teir báðir, at játtanin til tey trý sjúkrahúsini ikki kemur at halda út frá teimum tølum, teir hava fingið upplýst um nýtsluna í ár.

Teir harmast eisini um, at bara seks milliónir krónur verða settar av til at umvæla tann partin av Landssjúkrahúsinum, ið flutt verður frá, tá ið nýggi bygningurin verður tikin í nýtslu. Samstundis er als onki sett av til aðrar umvælingar á Landssjúkrahúsinum.

– Vit meta at tað er beinleiðis óforsvarligt, at umvælingar og viðlíkahaldsarbeiði á Landssjúkrahúsinum ikki fær størri játtan tá hugsað verður um hvørjum standi ein stórur partur av bygningunum eru í, siga teir báðir løgtingsmenninir úr javnaðarflokkinum.

Teir siga, at ein skikkað meting sigur, at tað skulu nýtast einar 300 milliónir krónur til umbyggingar, viðlíkahald og fyri at lúka brunateknisk krøv.

Í øðrum lagi átala Kristian Magnussen og Andreas Petersen harðliga, at eftir teirra tykki verður ov lítið sett av til serviðgerð uttanlands.

– Har er ætlanin at seta 67 milliónir av næsta ár. Men í fjør blivu brúktar 82 milliónir og metingar í ár vísa, at eisini 82 milliónir fara at verða brúktar í ár.

Samstundis verður sagt, at ætlanin er at seta 500.000 krónur av til starvsfólk, sum burturav skal arbeiða við hesum øki.

– Vit halda at tað er ein álvarsligur boðskapur at senda til føroya fólki umvegis fíggjarlógina, og serliga teimum, sum hava tørv á serviðgerð uttanlands at tað ikki verður játtað tað til hesa sjúkraviðgerð, sum er neyðugt.

Kristian Magnussen og Andreas Petersen átala somuleiðis, at landsstýrismaðurin eisini undirmetir játtanina til sjúkrakassar komandi ár.

– Játtanin til sjúkrakassarnar var 26,8 milliónir í 2003 og í ár er nýtslan mett at verða 32 milliónir. Men á fíggjarlógini fyri 2004 eru 26,8 milliónir settat av. Samstundis siga teir, at ongin fráboðan er í fíggjarlógaruppskotinum um nakrar broytingar ella tiltøk sum gera at játtanin heldur.

### Ivasamar framskrivingar

Løgtingsmenninir Kristian Magnussen og Andreas Petersen halda eisini, at játtanin til almannaverkið er merkt av ivasomum framskrivingum uttan raðfestingar og uttan víðskygni.

– Tað ørkymlar og órógvar undirritaðu at játtanin til heimarøktina ikki røkkur til at veita grundleggjandi heimarøkt og tað sær út sum, at næsta ár verður støðið tað sama sum í ár, har partur av heimarøktarveitingunum er avtikin í ávísum økjum, og fyrstu ferð síðani skipanin var stovnsett, er nú bíðitíð til at fáa heimarøkt.

– Vit átala at umstøðurnar hjá sinnisveikum sum hava verið út av lagi vánaligar seinastu árini ikki fáa tað neyðugu raðfestingina í fíggjarlógaruppskotinum fyri komandi ár.

– Ætlan landsstýrisins at selja íbúðarblokkarnar á Landssjúkrahúsinum ger støðuna hjá teimum sinnisveiku uppaftur verri, tí búfólkið á pensionatinum hervið verða húsvill, siga teir báðir.

Somuleiðis átala teir, at landsstýrismaðurin landsstýrismaðurin tveitir meir og meir yvir á kommurnurnar. fyri at fáa endarnar at røkka saman, sum teir málbera seg.

– Nú er ætlanin at barnaverndarøkið í óðum verkum frá 1. januar verður tveitt á kommunurnar.

– Økið tykist ikki at vera nóg væl fyrireikað og skotbráðið stutt, og tað er ógvuliga ivasamt um hetta økið skal umsitast hjá kommununum, siga Kristian Magnussen og Andreas Petersen

Teir átala eisini, at stuðulin til uppihaldspening verður avtikin, tí avleiðingin verður at fíggjarligu korini, bæði hjá gjaldara og móttakara, fara at versna.

Teir báðir limirnir í trivnaðarnevndini duga heldur ikki at síggja nakrar batar fyri fólka- og fyritíðarpensionistar. Teir síggja heldur ikki, at ætlanin er at geva fólki endurgjald fyri tað økta avgjaldstrýstið, sum landsstýrið í størri og størri mun áleggur landsins borgarum.

Teir vísa á, at skattalættin ikki fer at koma teimum fólkapensionistum sum bert hava fólkapensiónina at liva av, tilgóðar.

Fíggjarætlan 2004:

# Klaksvíkar kommuna lækkar skattin

**Í 2004 kunnu klaksvíkingar síggja fram til ein skattalætta upp á 0,5 %. Aftaná sáttmálabundnu íløgurnar er skúlin við Ósánna ovast á raðfestingarlistanum yvir íløgur í komandi ári**

FÍGGJARÆTLAN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Skatturin lækkar við einum hálvum prosenti komandi ár, raksturin er vorðin munandi dýrari, men av tí at kommunan er komin niður um eina álíkning í skuld, hevur býráðið gjørt av, at tað nú skal koma borgaranum tilgóðar við einum skattalætta. Fíggjarætlanin hjá Klaksvíkar kommunu javnvigar við 110 milliónum.

Sitandi meiriluti gjørdi eina avtalu, tá hann kom til, at tá fíggjarkarmurin hjá kommununi loyvdi tí, skuldi skatturin lækkast.

Kommunan hevur í fleiri ár nú rindað meiri enn neyðugt niður av skuldini, og er skuldin hjá kommuni nú komin niður um eina álíkning. Bruttoskuldin er í dag 80 milliónir krónur.

Skattalættin fer at kosta kommununi millum 2,5 og 3 milliónir krónur.

### Rakstur dýrkar

Íløgurkarmurin hjá Klaksvíkar kommunu í 2004 er áljóðandi 20 milliónir krónur. Meira enn helmingurin av hesum pengunum fara til sáttmálabundnar íløgur. Læknamiðstøðina og ídnaðarhavnina í Ánunum. Eftir hetta kemur so posturin Framtíðar skúlabygging, har fyrst og fremst ein víðkan av skúlanum við Ósánna er upp á tal.

– Hetta kemur at merkja munandi fleiri stovur í skúlanum, og er hetta nakað, sum er hart tiltrongt og hevur ligið á láni longi, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

Kostanðurin av rakstrinum í kommununi er øktur við 14 %. Tað er fleiri orsøkir til tað, sigur borgarstjórin.

Eitt nú er innanduraarbeiði á skúlanum við Ziskatrøð ein orsøk. Og so er raksturin av sambýlinum á Heygnum, forsorgin fyri væntandi barnaansing, sum varð løgd yvir á kommunurnar fyrr í ár og samsýningar og fundarpengar hjá barnaverndarnevndini eisini orsøkir til økingina av rakstrinum.

### Mentanarhús

Klaksvíkar kommuna hevur eina ætlan um eitt mentanarhús liggjandi á borðinum. Til komandi ár hevur kommunan sett 400.000 krónur av til eitt tílíkt hús. Somuleiðis eru 300.000 krónur setta av til eina møguliga nýggja ítróttarhøll.

Somuleiðis fara fólk í Árnafirði at kunna vænta sær eitt vatnverk. Á fíggjarætlanini er ein millión sett av til vatnverk í Árnafirði. Fíggjarætlanin hjá Klaksvíkar kommunu kemur fyri aftur á Býráðsfundi tann 18. november, og tá verður hon endaliga samtykt, sigur borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen.





*Heri Ellingsgaard, umsjónarmaður, visti als ikki av, at hansara sjúkrahús lá uttan streym í ein tíma fyrr í vikuni*

*Mynd: Solby*

# Sjúkrahúsið sloknaði

**Undir landsumfatandi steymsliti mikunáttina sviku neyðmotorarnir á Klaksvíkar sjúkrahúsi, so tað lá myrkt og lamið í útvið ein tíma. Eingin skaði hendi tíbetur, tí alt virksemi lá í fasta svøvni, men var tað um dagin, kundi illa viljað við. Umsjónarmaðurin visti als ikki um tilburðin**

STREYMSLIT
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

– Hevði tað hent um dagin, so var tað ein katastrofa. Men tíbetur var tað um náttina, og tí spældi alt væl av, sigur Heri Ellingsgaard, umsjónarmaður á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Mikunáttina í síðstu viku hendi tað á Klaksvíkar sjúkrahúsi, sum ikki má henda. Tá streymurin fór, tók neyðmotorurin ikki við, og tí lá sjúkrahúsi uttan streym í ein tíma.

Streymurin fór um alt landið, tí tekniskt brek var á einum verki, sigur Petur Gaardbo frá SEV. Streymurin fór eftir klokkan hálvgum tvey náttina til mikudagin. Flestu staðni var streymurin burtur í hálvan tíma. Men í Norðoyggjum kom streymurin ikki aftur, fyrr enn ein tíma seinna.

### Aðru ferð í 19 ár

Av SEV siga tey, at eingin ólukka hendi av streymslitinum, og kærurnar hava ikki verið meira enn vanligt, tá slíkt hendir. Men í Klaksvík kundi verið galin endi, um skaðin hendi um dagin, og til dømis ein skurðviðgerð var í gongd.

– Í 19 ár er hetta bara aðru ferð, at neyðmotururin ikki tekur við, tá streymurin fer. Talan er um eitt tekniskt brek, tí eitt rele varð farið. Vit hava annars eitt test-programm, sum vit koyra eina ferð um vikuna, har vit eftirkanna neyðmotorin. Tað gjørdu vit eisini vikuna frammanundan, men tað vísti onki galið. Hetta er slíkt, sum kann henda, sigur Heri Ellingsgaard.

Tíbetur hendi óhappið um náttina, tá einki virksemi er á sjúkrahúsinum. Fólk svóvu og hava nóg illa varnast, at streymurin fór. Men var tað um dagin, og virksemið í hæddini, so torir umsjónarmaðurin nóg illa at hugsa tankan lidnan.

– Tað kundi verið katastrofalt. Um vit opereraðu, so gekk alt tað elektroniska fyri. Bæði borimaskinur, narkosutól og onnur alneyðug tól, og tú kanst sjálvur ímynda tær, hvat so kundi hent, sigur Heri Ellingsgaard.

### Visti einki

Sjálvur visti umsjónarmaðurin als ikki um tilburðin, fyrr enn Sosialurin ringdi og spurdi hann. Tað er hann eitt sindur vónsvikin av.

– Tað er ikki rætt, at eg hoyri um eina so álvarsliga hending gjøgnum tykkum. Eg skuldi sjálvandi havt fingið tað at vita frá mínum fólki, men tey hava ikki mett tað havt stórvegis týdning, tí alt spældi væl av, sigur Heri Ellingsgaard.

Neyðmotorarnir á Klaksvíkar sjúkrahúsi eru frá 1984. Vanliga slær motorurin til einans 10 sekund eftir, at streymurin fer. Tað hendi herfyri, og tá vóru eingir trupulleikar. Spurdur, hvussu mann kann tryggja sær, at tað als ikki kiksar, sigur umsjónarmaðurin, at so skulu tveir neyðmotorar til, men tað er í so ógvusligt, heldur hann.

### Strangari reglur

Motorarnir klára vanligt trýst, men er nógv virksemi á sjúkrahúsinum, har bæði vaskað verður og køkurin koyrir fyri fullari megi, so er neyðugt at steðga onkrum virksemi, so sjálvar sjúkrafunktiónirnar virka til fulnar.

Umsjónarmaðurin viðgongur, at hann gjørdist eitt sindur kløkkur, tá vit fortaldu honum um óhappið, men nú ræður um at forða fyri, at tað kann henda aftur.

– Vit mugu bara stramma mannagongdirnar eitt sindur meira og vera meiri eftiransin, tá vit hvønn fríggjadag kann neyðmotorarnir, sigur Heri Ellingsgaard.

# Formansskapurin átalar Katrina Dahl Jakobsen

**Formaður Tjóðveldisfloksins fekk viðhald í sínari kæru um, at javnaðarkvinnan Katrin Dahl Jakobsen nýtti útspillandi málburð undir fíggjarlógarviðgerðini**

MÁLBURÐUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Katrin Dahl Jakobsen átti beinanvegin at fingið átalu fyri ta óbeinleiðis samanbering, hon gjørdi í røðu sínari.

Tað er greiða niðurstøðan hjá formansskapinum hjá løgtinginum, ið hevur viðgjørt eina kæru frá Høgna Hoydal, formanni Tjóðveldisfloksins. Høgni Hoydal kærdi Katrina Dahl Jakobsen fyri undir fíggjarlógarviðgerðini at brúka meginpartin av sínari røðu til persónliga útspilling av sær. »Hon helt á røðarapallinum eina mynd upp av undirritaða og legði meg undir propaganda og ósannleikar, ið kunnu samanberast við politikarar í Týsklandi undir nazistunum,« skrivaði Høgni Hoydal íkæruni.

Ítøkiliga segði Katrin Dahl Jakobsen soleiðis um Høgna Hoydal og hansara flokk: »Eg troysti mær ikki at nevna navnið á tí persóninum, men nakað av hesum snildunum hava okkara konservativu nationalistar eisini brúkt,« segði hon við greiðari tilsipan til sjálvan Hitler.

Ta framferðina hjá Katrin Dahl Jakobsen hevur formansskapurin nú átalað. Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur, at sambært stýrisskipanarlógini kann eingin løgtingsmaður uttan samtykki tingsins verða kravdur til svars uttantings fyri tað, hann hevur sagt á tingi.

– Hendan áseting leggur ta ábyrgd á tann einstaka tingmannin og formannin, at orðalagið er á einum slíkum støði, at helst ikki verður komið í ta støðu, at atkvøðast skal um at taka óárinið frá tingmenni, sigur Edmund Joensen og átalar Katrina Dahl Jakobsen.

Høgni Hoydal er væl nøgdur við hendan partin av niðurstøðuni hjá formansskapinum. Hann sigur, at hann tekur ikki slíkt persónligt, tí hann er so vanur við útspilling.

– Um eg skuldi tikið mær tykni av øllum, ið er sagt og skrivað um meg persónliga síðstu árini, so gjørdi eg ikki annað. Men hesaferð fullu orðini av tingsins røðarapalli, sum er hægsti pallurin í landinum. Um slíkt ikki verður átalað, so er tað eitt tekin til fólk um, at hetta er púrasta normalt, og tað beinleiðis eggjar øðrum at gera á sama hátt, sigur Høgni Hoydal.

Hann fekk kortini ikki viðhald fyri tann partin av kæruni, sum snúði seg um Kristian Magnussen. Javnaðartingmaðurin spurdi eftir sambandinum millum Tjóðveldisflokkin og yvirgangsfelagsskapirnar IRA og ETA.

Formansskapurin sigur, at tað eru sera víðir karmar fyri, hvat løgtingsmenn kunnu spyrja um, og staðfestast kann, at ein fundur, sum sipað varð til í Italia, fór fram.

– Formansskapurin heldur tí, at hóast orðalagið hjá tingmanninum var hvast, so snúði tað seg fyrst og fremst um ein spurning, sum kundi verið svaraður og afturvístur. Formansskapurin heldur tí ikki, at formaðurin bar seg skeivt at við ikki at átala hesum, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður.

Ítøkiliga segði Kristian Magnussen soleiðis: »Hvat er sambandið millum ETA og Tjóðveldisflokkin. Tí tað er eingin loyna, at ETA er ein rein terroristorganisatión, sum skýggjar demokrati heldur enn pestin. Tey drepa øll, sum standa í vegin, vinir og fíggindar, alt tað tey sleppa. Eg spyri hvat sambandið er millum tykkum,« segði Kristian Magnussen, sum vildi hava at vita, hvat vit kundu vænta okkum í Føroyum.

Høgni Hoydal er vónsvikin av, at hetta ikki er átalað og ætlar sær at svara formansskapinum.

– Sigur formansskapurin, at hatta er rætt, so ber til at spilla fólk niður í sand og øsku við at balla tað inn í ein spurning, og tað haldi eg ikki er rætt. Hatta átti at verið átalað, heldur Høgni Hoydal.